Tjóðskjalasavnið

# Stutt og greitt um dátureinsan í skjalasavnsútgávum

- Vegleiðing til kunngerð 1007 um skjalasavnsútgávur.

## Inngangur

Tað er uppgávan hjá Tjóðskjalasavninum at samla inn og goyma álítandi dátur. Tí skal skjalasavnsútgávan av einari kt-skipan endurspegla dátur í rakstrarskipanini. Skjalasavnsútgávan verður ofta framleidd av einum uttanhýsisveitara.

Viðhvørt veit ella uppdagar myndugleikin ella kt-veitari tess, at dátur innihalda ymisk sløg av feilum.

Allir feilir skulu ikki rættast, sjálvt um tað er møguligt. Hetta kann tykjast løgið, men tað kemst av kravinum um eftirfarandi/álítandi dátur í skjalasavnsútgávuni. Um so er, at tiknar eru fyrisitingarligar avgerðir, grundað á dátur, ið ikki hava verið í lagi ella hava havt brek, skulu tann ella teir feilirnir eisini síggjast í skjalasavnsútgávuni. Bert soleiðis verður tað møguligt at skilja grundarlagið fyri avgerðini, ið gjørd er.

Tað er heldur ikki loyvt at royna at betra um dátuinnihaldið í mun til rakstrarskipanina. Feilir mugu ikki rættast, um so er, at tað kann verða ivi um, hvat feilurin meinast við. Tað er betri at varðveita feilir enn at gita skeivt.

Henda vegleiðingin gevur dømi uppá tilfelli, har feilir **skulu** rættast, og dømi uppá tilfelli har **ikki** er loyvt at rætta dátufeil – at fremja dátureinsing. Dømini í vegleiðingini eru ikki nøktandi og skulu ikki skiljast sum ein svarlisti. Tað kunnu henda nógvir ymiskir hættir av feilum, og tað er valla gjørligt at lýsa teir allar gjølla. Um so er, tú ert í iva kanst tú taka samband við Tjóðskjalasavnið.

Í sambandi við framleiðslu av einari skjalasavnsútgávu skal skiljast ímillum sjálvt innihaldið í teimum dátum, sum er kunningarinnihaldið í rakstrarútgávuni av skipanini og bygnaðir og format, sum dátur eru goymdar í. Tað er loyvt at broyta bygnaðin og formatini við heimild í kunngerðini um skjalasavnsútgávur (1007), men ikki at broyta í upplýsingarinnihaldinum av dátum.

## Kunningarinnihaldið í dátum

Tað er ikki loyvt at broyta uppá kunningarinnihaldið av dátum uttan mun til endamálið.

Tað er soleiðis ikki loyvt at beina burtur dátur grundað á dátuinnihaldið, heldur ikki um so er, at tað er fyri at tryggja viðkvæmar upplýsingar í skipanini. T.d. má myndugleikin og veitarin ikki fjala (gera navnleysar) dátur ella beina burtur viðkvæmar persónsupplýsingar ella aðrar trúnaðarligar upplýsingar. Um so er, at skipanin inniheldur persónsupplýsingar, upplýsingar, ið eru latnar í trúnaði ella flokkaðar upplýsingar, skal tað móttakandi skjalasavnið verða kunnað um hetta. Atgeingi til viðkvæmar upplýsingar fylgja reglunum í skjalasavnslógini um atgeingisfreistir.

Tað er heldur ikki loyvt at stytta um ella broyta dátuinnihaldið, hóast tað hevði gjørt tað lættari at brúka. Til dømis eitt sokallað “timestamp” má ikki broytast til eina dagfesting, og eitt desimaltal má ikki rundast av til eitt heiltal.

Kortini finnast undantøk, har Tjóðskjalasavnið/Rikisskjalasavnið krevja, at broytingar verða gjørdar.

Um so er, at í rakstrarskipanini eru felt, sum hava framman- ella eftirstillað blanktekn/glopp, skulu hesi beinast burtur. Um blonktekin/glopp hava týdning fyri lyklarelatiónir í skipanini, skulu UTF8 tekin verða sett í staðin fyri blonktekini/glopp, ið tryggja, at lykilin framhaldandi er unikkur/-serstakur. Ikki øll UTF8-tekin eru tó loyvd. Sí vegleiðing til kunngerð um skjalasavnsútgávur, fylgiskjal 5, partur D.

# Dátulýsingar, bygnaðir og dátuslag

## Kotur og lýsingar

Í dátum eru ofta kotur. Tað kunnu vera fakkotur, ið verða brúktar av myndugleikanum, so sum lands-, stovns- ella til dømis sjúkdómskotur. Hesin formur fyri kotur kallast - í hesi vegleiðing - fyri **frábrigdi A**. Tað kunnu eisini vera kotur, sum í mótsetning til frábrigdi A ikki er sjónligar fyri brúkaranum av skipanini. Tað eru kotur, sum forritanarfláan/nýtsluskipanarfláan umsetur til kláran tekst í nýtslumarkamótinum. Hesin háttur fyri kotu kallast í hesi vegleiðingini fyri frábrigdi B.

Fyri bæði frábrigdini er galdandi, at tey skulu umsetast í skjalasavnsútgávuni.

- **Frábrigdi A**: Tann fakliga vitan, sum er á økinum og liggur aftanfyri kotuna, skal fasthaldast í skjalasavnsútgávuni. Tað fer ofta at verða neyðugt, at fakfólk hjá tí avhendandi myndugleikanum veitir/stuðlar við teirra vitan í sambandi við skjalfesting av dátum til skjalasavnsútgávuna. Um so er, at tað snýr seg um eina gamla fakskipan, ið ikki longur er í rakstri, kann tað verða ein stór uppgáva at finna rættar kotuumsetingar. Myndugleikin má tá gita, hvønn týdning koturnar hava og brúka hesi git sum umsetingar í eini skjalasavnsútgávu.

  Skjalfestingin av kotuvirðinum og tí fakligu vitanini skal vera partur av kontekstskjalfestingini í skjalasavnsútgávuni. Tá tað eru kotur av hesum slagi í eini skipan, skal myndugleikin seta seg í samband við Tjóðskjalasavnið/Rigsarkivet, sum síðani ger av, hvussu skjalfestingin skal gerast.

- **Frábrigdi B**: Forritanarfláan og nýtslumarkamótið eru ikki partur av avhendingini. Týðingin/avkodingin sæst her sum útgangsstøði í rakstrarskipanini, tí umsetingin liggur í forritanarflánni. Tað kann tó vera atvoldin til feilir. Um so er, at koturnar ikki eru serstakar/unikkar, t.d. um kotur eru endurnýttar í eina tíð. Tað sama kann vera galdandi, um dagføring av kt-skipanini hevur ført við sær broytingar í kotunum og nýtsluni av hesum. Her er neyðugt at hugsa um, hvørjir manglar skulu rættast fyri at gera innihaldið av skjalasavnsútgávuni skilligt, og hvørjir feilir skulu vera óbroyttir, soleiðis at

skjalasavnsútgávan best endurspeglar rakstrarútgávuna. Ein sovorðnan spurning kann skiftast orð um við Tjóðskjalasavnið ella Rikisskjalasavnið.

Um kotur, les haraftrat **vegleiðing til kunngerð um skjalasavnsútgávur**, fylgiskjal 4, partur A.

### Dátusløg

Tað er eitt krav, at dátusløg frá rakstrarútgávuni skulu konverterast/broytast, t.d. serligar dagfestingar, sum ikki er loyvdar, sí kunngerð um skjalasavnsútgávur (1007). Tað kann í ymiskum førum verða ein metingarspurningur, hvussu konverteringsuppgávan verður loyst sum best. Tað er veitarin hjá myndugleikanum, sum skal gera metingina, men Tjóðskjalasavnið/Ríkisskjalasavnið skal altíð spyrjast, um so er, at tað eru ivamál um ta bestu loysnina.

### Relatiónir

Skjalasavnsútgávur av ikki-relatiónellum kt-skipanum skulu verða relatiónellar við heimild í kunngerð um skjalasavnsútgávur (1007). Tað vil siga, at dátur skulu umskipast, og her er talan um neyðugar endurstovningar av dátum, sum tryggja samanhang í skjalasavnsútgávuni, svarandi til samanhangin, sum finst í rakstrarskipanini.

Tað mugu bert gerast broytingar í relatiónum, um so er, at tær endurspegla samanhangin í dátum í rakstrarskipanini.

- Í førum, har ein forritanarflá hevur viðgjørt relatiónir, skulu tabelrelatiónirnar stovnast í skjalasavnsútgávuni.
- Í førum, har feilir í relatiónum hava verið ein trupulleiki í rakstrarskipanini, og kanska eru orsøkin til eitt ófullfíggjað avgerðargrundarlag, má feilurin ikki rættast.

Í báðum førum skal tað skjalfestast, hvussu relatiónirnar eru viðgjørdar. Skjalfestingin skal vera partur av kontekstskjalfestingini í skjalasavnsútgávuni. Myndugleikin seta seg í samband við Tjóðskjalasavnið/Ríkisskjalasavnið, sum vegleiðir um, hvussu skjalfestingin skal vera.

Um relatiónir, sí haraftrat **vegleiðing til kunngerð um skjalasavnsútgávur** (1007), fylgiskjal 3, part B, fylgiskjal 4, part C og D.

## At fylgja eini avhendingaráseting

Tjóðskjalasavnið flýggjar út eina avhendingaráseting, sum, saman við **kunngerðini fyri skjalasavnsútgávur**, ásetur innihaldið í skjalasavnsútgávuni. Hon skal altíð fylgjast nágreiniliga, men tað kunnu vera umstøður, har hetta er trupult. Um so er, at avhendingarásetingin av eini ella aðrari orsøk ikki kann verða fylgd – t.d. um so er, at dátuúrtøka ikki kann gerast tann ásetta endanardagin, av tí at heiligdagar ella feria hava verið hildin – skal Tjóðskjalasavnið verða kunnað.